# av nýggja árinum?



**Navn: Birgith Lassen**
**Aldur: 14**
**Havn**

*Setti tú tær nakað nýggjárslyfti í fjør?*
– Ja, hvat var tað nú tað var... Ájú, at eg skuldi royna at bøta um karakterirnar í skúlanum.
*Hevur tú hildið tað?*
– Nei
*Hevur tú nakað nýggjársynski fyri komandi ár?*
Tað sama, at karakterirnir skulu blíva betri hjá mær



**Anna Sørensen**
**36 ár**
**Klaksvík:**

*Setti tú tær nakað nýggjárslyfti í fjør?*
– Nei, tað gjørdi eg ikki.
*Hevur tú nakað nýggjársynski fyri komandi ár?*
– Nei, tað havi eg ikki. Eg trúgvi ikki upp á slíkt, tí man heldur tey jú ongantíð. Og hartil haldi eg, at tað ikki nýtist at vera júst til nýggjárið, at man setur sær nakað fyri.

**Hilda Sjúrðardóttir Kjølbro**
**29 ár**
**Viðareiði**

***Setti tú tær nakað nýggjárslyfti í fjør?***
– Nei, tað trúgvi eg aldrin, at eg gjørdi.
***Hevur tú nakað nýggjársynski fyri komandi ár?***
– Nei, tað er ikki nakað, sum eg gangi og hugsi um í øllum førum. Men sjálvandi, man vil jú ongantíð taka uppá ella nakað. Nýggjárslyfti eru bara skek. Summi seta sær eitt, og tey klára eisini at halda tey. Men so er tað sjálvandi eisini ofta, at man ikki klárar at halda tey.





**Norðleif við Krógv**
**Hvalba**

**Eg hevði onki nýggjarslyfti sum so í fjør, men eg hevði kortini tað ynski, at tað skuldi gangast mær og mínum væl og tað hevur eisini eydnast so hampuliga við tí.**
**Vanligu nýggjárslyftini plaga at vera halda uppat at roykja, at drekka minni ella at ansa eftir vektini. Men núeri eg í teirri støðu, at eg hvørki royki ella drekki og eg vigi heldur ikki ov nógv, so í so máta eeru ongar lastir at sleppa av við.**
**Kortini havi eg sett mær fyri at røra meg eitt sindur meir í tí nýggja árinum, tí tað kundi trongt til og somuleiðis fari eg at royna at økja um handilin og tað virksemi, eg havi í Hvalba.**



**Maud Næs**
**Hvalba**

Síðsta nýggjár hevði eg onki nýggjárlyfti, tí tað plagi eg ikki at hava. Men nú eg eri farin um tey fýráti í ár, skal mítt nýggjárslyfti vera, at eg skal vera meiri tilvitað um mín lívshátt, so eg ikki gerist eitt offur fyri vælferðasjúkum, ið raka einstaklingar og vesturlendska samfelagið í dag. Saman við onrkum starvsfelaga á miðnámsskúlanum havi eg sostatt sett mær fyri at sleppa av við nøkur kilo.
Annars ætli eg, at halda á fram at royna at vera eitt positivt og skapandi menniskja. Vónandi fái eg eisini so mikið av orku, at eg kann hjálpa rundan um meg, har tað er neyðugt. Annars fari eg at nýta høvi, at takka øllum tykkum, ið gjørdu mær føðingardagin so hugnaligan og ynskja tykkum øllum eini gleðilig jól og eitt av Harranum vælsignað nýggjár.



**Navn: Sámal Joensen**
**Aldur: 25**
**Hoyvík**

***Setti tú tær nakað nýggjárslyfti í fjør?***
– Nei tað gjørdi eg ikki. Sjálvt um man sjálvandi altíð kann royna at verða eitt betri menniskja
***Hevur tú nakað nýggjársynski fyri komandi ár?***
– Eg haldi ikki. Eg havi tað gott, sum er, og eg kann ikki koma í tankar um nakað ynski, sum so...